# Gomlu KÍ-ararnir vunnu FM



Fyri fyrstu ferð hevur KÍ vunnið FM fyri oldboys. Hetta hendi til finaluumfarið, sum var í Sandavági í dag. Seks lið vóru við í kappingini, og finalan kom at standa ímillum 07 Vestur og KÍ. Vanligi dysturin endaði við javnleiki, og tí varð neyðugt við brotsspørkum fyri at avgera finaluna. Har endaði tað við, at KÍ dró longra stráið og vann FM-heitið. Á myndini síggjast KÍ-spælararnir. Aftan frá vinstru: Richard Hansen, Fríðin Ziskason, Rúni Heinesen, Símun Gullaksen og Kaj Dam. Framman frá vinstru: Adreas Josephsen, Stig Elttør, Janus Ellingsgaard og Jákup Oluf á Lakjuni (Mynd: Karl Vidtfeldt)

# Jon Dahl skoraði tvey mál

Danski álopsspælarin Jon Dahl Tomasson hevur verið nógv burtur frá fótbólti seinastu mánaðirnar, men um vikuskiftið gjørdi hann aftur um seg. Feyenoord spældi í gjár ímóti Ajax, og Jon Dahl Tomasson tryggjaði Feyenoord javnleik. Jon Dahl skoraði bæði málini í 2-2 javnleikinum. Seinna málið hjá danska málskjúttanum varð gjørt við brotssparki.



*Gullkrónurnar verða ikki handaðar EB/Streymi fyrrenn leygardagin 25. oktober, tá ið uppgerðin ímóti HB í 27. umfari í Streymnesi verður lokin. Men longu dagin fyri mikkjalsmessu liggja gullkrónurnar á silvurfati í Runavík!*

# Gullið bíðar á silvurfati

**Nú er tað góður møguleiki fyri, at EB/Streymur fer at vinna fyrsta FM heitið, tá ið teir í Sundalagnum um eina viku fara at spæla á útivølli ímóti meistarunum í NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EB/Streymur tryggjar sær fyrsta FM heitið, áðrenn tað verður farið um mikkjalsmessu. Hetta varð spátt í hesum teiginum stutt eftir ólavsøku. Vit hava fleiri ferðir seinastu vikurnar mint á spádómin, og nú er tað upp til teir í EB/Streymi sjálvar at gera av, um meistaraheitið skal vera í pottinum á mikkjalsmessu. FM heitið liggur á silvurfati hjá meistarunum í Runavík!

Sunnudagin 28. september fer EB/Streymur at spæla á útivølli ímóti NSÍ. Tað eru tólv stig eftir at spæla um. Eftir 23. umfar er EB/Streymur tíggju stig framman fyri NSÍ. Tað vil við øðrum orðum siga, at um tað eydnast EB/Streymi at vinna eitt stig, so verður munurin millum meistararnar frá í fjør og EB/Streym framvegis tíggju stig, tá ið níggju stig vera eftir at spæla um.

Bæði B36 og HB eru ellivu stig aftanfyri EB/Streym. Málmunurin hjá EB/Streymi er betri enn tann hjá B36 og lakari enn tann hjá HB. Mikkjalsmessa er mánadagin 29. september, og nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður við spádóminum, sum vit høvdu í hesum teiginum stutt eftir ólavsøku!

Í føroyska fótbóltsheiminum og ikki minst í felagnum sjálvum hevur tað aftur og aftur verið sagt, at kappingarárið hevur verið miseydnað hjá HB. Hjá teimum flestu hevði tað verið mett sum fínt kappingarár at vinna silvurkrónurnar. Í HB verður ikki roknað við øðrum enn at vinna FM heitið, og í hvussu so er verður roknað við og kravt, at liðið skal vera við í kappingini um meistaraheitið. Hesa ferð er HB ikki við í kappingini um FM heitið. Men tað er framvegis møguleiki fyri, at liðið fer at vinna silvurkrónurnar, og tað er ikki so galið – í hvussu so er ikki hjá øllum øðrum enn teim um í HB.

Tølini siga, at tað er á útivølli, at høvuðsstaðarfeløgini hava mist tað, sum kundi havt borið tættari kapping við EB/Streym um FM heitið við sær. Meðan oddaliðið higartil hevur vunnið fimm ferðir á útivølli, hevur HB bara vunnið tveir útidystir, og B36 hevur vunnið tríggjar ferðir á útivølli.

NSÍ og Víkingur hava vunnið fýra ferðir á útivølli í part. Hesa ferð fekk Víkingur einki við sær úr Streymnesi. Um víkingar framvegis skulu verða við í kappingini um heiðursmerkini, so verður neyðugt hjá teimum at vinna á heimavølli ímóti HB næsta sunnudag.

### Botnurin brennur framvegis

Í hinum endanum drógu skýggini uppaftur meiri saman um Skála, sum einki fekk burturúr, tá ið toftamenn vitjaðu. Skála er seks stig og vánaligan málmun frá bjargingini. Tað vil siga, at tað er neyðugt hjá skálamonnum at fáa fult hvørja ferð, um nakar møguleiki skal verða fyri bjarging.

Sigurin á Skála ber við sær, at B68 er sloppið undan vandanum fyri at flyta niður. Harvið hava toftamenn rokkið málinum, sum teir undan kappingarbyrjan settu sær. Fuglfirðingar taptu í Gundadali. Við sigri á Skála á heimavølli í 24. umfari kann ÍF tó vera heilt væl fyri í kappingini um at sleppa undan niðurflyting.

Klaksvíkingar oppaðu seg bæði á og kring vøllin, og tað eydnaðist at fáa fulla úrtøku ímóti B71. Enn eru ikki allar súðir syftar hjá sigursvandu norðoyingunum. KÍ er trý stig frammanfyri B71, og málmunurin hjá klaksvíkingum er betri, enn hann er tað hjá sandoyingum, og tað skulu í hvussu so er tvey umfør til fyri at venda upp og niður millum 8. og 9. plássið.

Um tað eydnast Skála at vinna í Fuglafirði í 24. umfari, kann tað gerast heilt spennandi, tá ið ÍF annan sunnudag fer at vitja í Klaksvík.

# Líka fyri Loka og Tór

**Skulu videoprógv brúkast, og disciplinerdómar dømast, so er tað alneyðugt, at greiðar reglur verða gjørdar fyri, hvussu fara skal fram í slíkum málum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Fríggjadagin kom Aganevndin hjá FSF við úrskurði sínum, har tveir spælarar hjá Víkingi fingu til samans tríggja daga leikbann fyri gerðir sínar, tá dysturin millum Víking og B68 varð blástur av.

Sum Atli Gregesen – ið er ein av leikbannaðu spælarunum - sjálvur segði í samrøðu við Rás2 fríggjadagin, so er tað í fínasta lagi, at gerðir av hesum slag kosta leikbann.

Men tað er ikki í fínasta slag, tá málviðgerðin av slíkum málum ber bráð av tilvild. Og tað hevur tað í ávísan mun gjørt hesaferð.

Tilvildin er her, at dómar verða feldir við útgangsstøði í einstøkum málum, heldur enn í einum føstum politikki, og tað er altso ikki serliga tryggjandi fyri rættarstøðuna. Vit hava áður á hesum síðum samanborið úrskurðin hjá Ítróttadómstólinum í kærumáli millum Stjørnuna og Neistan fyri tveimum árum síðani, og tí er tað stórt spell, at úrskurðurin hjá Aganevndini ikki kann kærast til yvirkærunevndina. Tað er í øllum førum tað, sum Aganevndin sjálv staðfestir, men í reglunum fyri Yvirkærunevndina verður sagt, at nevndin millum annað kann viðgera mál av prinsipiellum týdningi, og tí er spurningurin, um Víkingur ikki átti at roynt málið her.

Tí talan er um serstakliga prinsipielt mál, har rættarpraksis verður ásett út frá eini einstakari hending. Og spurningurin er tá, um tað er nóg mikið at vísa til UEFA-reglur á økinum. Ikki minst tí hetta skapar enn ein áhugaverdan pendant til málið millum Stjørnuna og Neistan á sinni.

Samstundis eru tveir aðrir lutir, sum tykjast heilt merkisverdir í málsviðgerðini. Tað eru hóast alt lidnar tríggjar vikur, síðani hendingina í Sarpugerði, og tí virkar tað nakað klossut, at fráboðan um leikbann skal koma somikið seint í eini viku. Hjá Víkingi mundu teir í øllum førum hava fyrireikað seg uppá, at Atli Gregersen var tøkur, og tað kundi verið betur avstaðfarið.

Hartil er eisini heilt merkisvert, at úrskurð ikki samstundis varð gjørdur í málinum um hendingina eftir dystin millum Víking og B36. B36 hevði sum skilst somu tíðarfreist sum Víkingur at koma við sínum viðmerkingum. Hesar vórðu eisini lætnar Aganevndini um sama mundið, og so mátti tað ikki tikið alla verðsins tíð, um hetta málið eisini varð viðgjørt á sama fundi. Ikki tí. Tað kann í prinsippinum gera tað sama, nær eitt leikbann rakar. Men tá tvey mál verða send Aganevndini samstundis, og tá partarnir í ymsu málunum koma við sínum aftursvari samstundis. So mátti væl borið til at viðgjørt bæði málini, heldur enn at skapa gróðrarbotn fyri spekulatiónum um, at tað er betri fyri B36, um eitt møguligt leikbann rakar komandi umfarið, heldur enn til dystin í gjár.